
www.summarfestivalur.fo
Takk til øll sum stóðu saman um
Summarfestivalin 2007!
Takk fyri allar bólkar og tónleikarar. Tey, sum av hjartans huga sungu og spældi á festivalinum – og ikki at gloyma tey, sum vóru forðaði at trína pallin leygarkvøldið.
Takk til pallsmiðir og tøkningar. Fyri alt tað tit megnaðu at byggja upp og sum tit ábyrgdarfult riggaðu av, tá ið veðrið, nærum uttan ávarðingar, vísti sín mátt.
Takk til eftirlitsfólk, bjargingartænastuna, sløkkiliðið, sjúkrahúsið, samarittar og løgregluna. Takk fyri góða fyrireiking, arbeiðsorku og støðufesti, bæði tá ið fólkamongdin og tónleikurin fylti festivaløkið og í illveðrinum tá vandi var á ferð.
Takk til hjálparlið og ábyrgdarfólk, sum altíð eru tilreiðar tá ið á stendur. Arbeiðsfólk og skilafólk, sum eru drúgv í sínum gerningi og altíð royna at gera sítt besta.
Takk til Klaksvíkar Býráð og Kunningarstovuna fyri eitt mennandi samstarv og viljan at hugsa frameftir og lyfta í felag
Takk til allar ónevndar og ókendar vertir og veitarar, familjur og húseigarar, sum lótu allar dyr á víðan vegg fyri festivalgestum – ikki minst leygarkvøldið, tá góðvilji og hjartarúm gav øllum húsarúm.
Takk til okkara drúgvu stuðlar og sponsorar, sum hava lagt lunnar til ein livandi og fólksligan festival, sum alt ov tíðliga gjørdist vaksin.
Takk til allar festivalgestir, tey sum eru heimahoyrandi í Norðoyggjum og tey sum aftur í ár leitaðu sær á Summarfestival. Takk fyri tykkara góðsemi, samhuga og blíð orð á vegnum. Takk fyri nógva tónleikin, sangin, vinarlagið og veitslurnar leygarkvøldið, tá útikonsertirnar tagnaðu. Tað er hugaligt at vita, at tað skal meira til enn styrkin av tónleikinum fríggjakvøldið ella nógvi vindurin leygarkvøldið at blása fjøldina um koll.
Takk øll somul fyri eitt minniligt vikuskiftið.
NORÐOYA SPARIKASSI
Sosialurin
Summar FESTIVALUR
– HAR STJØRNURNAR
Postverk Føroya
PF HØJGAARDS HANDILSVIRKI
TRYGD
KJØLBRO
Shell
FØROYA TELE
ATLANTIC AIRWAYS
Ivan Johansen Bilar
Føroya Bjór
klaksvíkar kommuna
J.A.P.